

# BJARNASON SKAL HAVA SÍN OLYMPISKA GULLVINNARA

– EG HEVÐI HELST **GRÁTIÐ**, UM TAÐ VARÐ GJØRT **UPP**, HVUSSU NÓGV EG FÁI Í **TÍMALØN**, SIGUR **JÓN BJARNASON**, SUM HEVUR **OFFRAÐ** SÍTT LÍV UPP Á **SVIMJINGINA** Í SUÐUROYNNI. HANN SKAL HAVA SÍN **OLYMPISKA** GULLVINNARA, GER HANN GREITT. **VÁGBINGURIN** ER EIN **VENJARI** Í **HEIMSKLASSA**, HELDUR NÆSTFORMAÐURIN Í **SVIMJISAMBANDINUM**



**INTERVIEW**

**Uni Holm Johannesen**
uni@sosialurin.fo

Starvsfólkini í sølubúðunum kring landið fara so smátt at seta dagbløðini á hillarnar hendan vetrarkalda seinnapartin í oktober. Sum vanligt hava blaðfólkini á Sosialinum og Dimmalætting sitið og buldrað niður á knappaborðið seinastu tímarnar, so blaðið kann fara til prentingar til tíðina.

Árið er 2005.

Høvuðssøgan er, at Torbjørn Jacobsen, tingmaður, hevur verið ávirkaður, meðan hann koyrdi bil.

Sosialurin skrivar, at ungdómar vilja útseta fyrsta snapsin, tí tey ungu fáa fyrsta snapsin ov tíðliga.

Dimmalætting boðar í sínari útgávu frá, at Birgir Enghamar, sum er formaður í fótbóltsfelagnum HB, er dømdur 20 dagar í hefti fyri at undirskriva arbeiðsgevaraváttanir við skeivum upplýsingum.

Í meldrinum av gerandsligu og politisku tíðindunum, sum dagbløðini borðreiða fyri lesarunum, hevur Dimmalætting prátað við ein vágbing, sum tvær vikur framman undan tók við starvinum sum landsliðsvenjari í svimjing.

Nýggjur landsliðsvenjari setur nýggja kós, stendur við stórum og svørtum bókstavum á ítróttarsíðuni, sum er aftarliga í blaðnum.

– Eg havi stórt sjálvsálit, og eg veit, at eg eri væl egnaður sum landsliðsvenjari, verður bersøgni venjarin endurgivin fyri at siga.

Hansara dreymur er at venja ein føroyskan olympiskan svimjara. Við ongum kappingarhyli, og vánaligum umstøðum annars, er hann farin undir at røkka sínum máli.

Tað eru fá, sum vísa landsliðsvenjaranum og samrøðuni stórvegis ans hendan dagin. Vónleyst og arrogant tvætl, halda fleiri.

Fimm ár seinni situr sami maður fattur og róligur við køksborðið í sínari lítlu íbúð í Vági og fyrireikar enn eina venjing hjá nøkrum ungum svimjarum í Suðuroy.

Hann hevur takkað fyri seg sum landsliðsvenjari, og virkar nú sum yrkisvenjari í Suðuroyar Svimjifelag. Hann hevur vunnið sær serstøðu millum máttmestu ítróttarvenjararnar í landinum. Føroysk svimjing hevur flutt seg fleiri míl nærri hansara dreymi, síðan hann flutti aftur til Føroya í 2005. Við glitrandi heiðursmerkjunum, sum føroyingar hava vunnið í altjóða kappingum, hevur hann átt stóran leiklut í, at føroyski hugburðurin til svimjing er kollveltur.

Við slóðbrótandi venjaranum og superbrandinum Páli Joensen á odda kann føroyska tjóðin ikki annað enn taka hansara ambitiónir í álvara.

– Sjálvandi visti eg, at tað ber til, sigur Jón Bjarnason, nú fimm ár eru liðin, síðan blaðgreinin varð prentað.

## Tí ber tað til

– Føroyingar hava søguliga livað undir truplum korum, har tað ikki hevur verið ríkligt av tilfeingi at taka av. Fyrr var neyðugt at rógva út ella fara í bjørgini fyri at fáa mat til dagin. Føroysku landbúnaðarmenninir tóku sum givið, at teir vóru noyddir at kíta seg heilt út á markið fyri at yvirliva. Eg havi altíð hildið, at føroyingar eru eitt slag av supermenniskjum. Serstaki eginleikin at stríðast fyri at hóra undan mótburðinum er onkursvegna vorðin ein integreraður partur av okkara fólkaslagi. Slíkan stríðshugburð síggi eg ikki í dønum og øðrum. Eg visti, at føroyskir svimjarar við hasum hugburðinum kunnu svimja olympiskt gull til Føroya, greiðir Jón Bjarnason frá.

Við einum vilja av stál, jarnharðari disiplin og professinalismu fyri hvønn millimetur, hevur hann smíðað svimjarunum í Suðuroynni ein tryggan pall at standa á.

Hvønn dag stendur hann á kantinum við lítla svimjihylin í Vági við stoppuri í hondini og leggur svimjarunum lag á. Úrslitið er ein rúgva av ungum og evnaríkum svimjarum.

Rókur í Jákupsstovu er næstformaður í Svimjisambandinum. Hann staðfestir fegin týdningin, sum Bjarnason hevur fyri føroyska svimjing.

– Teppið verður skrætt undan svimjingini, um hann rýmir úr Føroyum. Grundarlagið, sum hann hevur bygt, fer í knús, tí eingin er førur fyri at taka við stóru ábyrgdini, sum støðan er. Vit skulu virðismeta, at hann tímir at arbeiða í Føroyum undir hesum umstøðunum, sigur Rókur í Jákupsstovu.

## Fór venjaravegin

Jón Bjarnason var millum fremstu svimjararnar í sínum árgangi, tá hann brádliga gavst at svimja sum 17 ára gamal. Orsøkin var einføld. Vágs Svimjifelag, sum seinni legði saman við Tvøroyrar Svimjifelag og fekk navnið Suðuroyar Svimjifelag, kundi ikki útvega honum ein venjara. Hann hevði lítlan áhuga í at halda fram sum venjari hjá sær sjálvum.

Tað stóð honum skjótt í boði at gerast partur av venjaratoyminum hjá Tvøroyrar Svimjifelag. Miðskeiðis í nítiárunum var hann ráðgevi hjá millum øðrum Shailu millum Garðarnar